# Edith Mørkøre í Ribarhús



*Edith Mørkøre sæst her við tveimum av teimum 30 akrylmálningunum, sum verða at síggja í Ribarhúsið frá 8.–20. apríl*

**Fríggjadagin 8. apríl letur ein listaframsýning upp í Ribarhús í Fuglafirði. Tað verður Edith Mørkøre, ið fer at sýna akrylmálningar fram**

FRAMSÝNING
*eydna@sosialurin.fo*

Í døgunum frá 8. til 20. apríl hevur Edith Mørkøre listaframsýning í Ribarhús í Fuglafirði. Edith hevur fyrr sýnt málningar fram, men við á hesi framsýningini verða bert nýggir málningar.

Framsýningin hevur fingi heitið "Lívsløtur", av tí, at tær flestu myndirnar snúgva seg um ymiskar støður, sum vit menniskju kunnu koma út fyri her í lívinum.

Við á framsýningini verða 30 nýggir akrylmálningar.

Framsýningin letur upp fríggjadagin kl 17.00. Fyrstu løtuna fer Jákup Heinesen at spælia á tangentar, og eisini verður bjóða kaffi/the og smákøkur.

### Opið verður soleiðis:

Fríggjadagin 8/4 frá kl 17.00 til 20.00.
Leygardagin 9/4 frá kl 11.00 til 16.00.
Sunnudagin 10/4 frá kl 14.00 til 18.00.

Til og við 20 apríl er opið somu tíðir sum Piddasahandil, gerandisdagar frá kl 15.00 til 17.30 og leygrdag frá kl 11.00 til 13.00.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

# Gistingarhús og matstovur í Vinnuhúsinum

**Gistingarhús- og matstovufelag Føroya er nú partur av Vinnuhúsinum. Hetta stigið er tikið, tí formaðurin Uni Danielsen heldur, at ferðavinnan verður meira sjónlig á henda hátt**

VINNUHÚSIÐ
*eydna@sosialurin.fo*

14. mars var avgerð tikin um, at Gistingarhús– og matstovufelagiðskuldi gerast ein partur av virkseminum í Vinnuhúsinum, og fríggjdagin í farnu viku hevði felagið eisini sín fyrsta fund í Vinnuhúsinum.

### Fleiri orsøkir

Uni Danielsen, sum er formaður í felagnum sigur, at hetta stigið er tikið av fleiri orsøkum. Fyrst og fremst, tí at ferðavinnan á henda hátt verður meiri sjónlig og verður tikin í størri álvara, um hon samstarvar við aðrar vinnugreinar.

Ymiskir trupulleikar, sum gistingarhús og matstovur stríðast við, eru jú teir somu, sum aðrar vinnugreinar eisini hava. T.d. nevnir formaðurin vantandi samskipan av øllum teimum mongu myndugleikunum, ið skulu geva loyvi til eitt byggimál.



*Gistingarhús- og Matstovufelagið er nú ein partur av Vinnuhúsinum. Hetta fer at gera ferðavinnuna meiri sjónliga, og hetta er samstundis fyrsta stig av vónini hjá Uni Danielsen, um at allar fyritøkur í ferðavinnuni einaferð kunnu skipast í egnum felag*

Uni Danielsen vónar somuleiðis, at tað við tíðini fara at verða fleiri yrkisgreinar, ið eru knýttar at ferðavinnuni, ið fara at gerast partur av Vinnuhúsinum. T.d. bussførarar, ferðaskrivstovur o.t. Vónin er, at allar fyritøkurnar, sum fáast við ferðavinnu, einaferð kunnu savnast í eitt felag.

### Góðar vónir

Formaðurin heldur annars at ferðavinnan er ment seinastu árini, og hann hevur góðar framtíðar vónir.

– Fólk hava alsamt meiri frítíð, og tey brúka alt meiri pening uppá at ferðast. Vit skulu bert megna at selja okkara land sum eina serstaka uppliving, sigur Uni Danielsen, formaður í Gistingarhús- og Matstovufelagnum.

Nú nógv verður tosað um alheimsgerð og hóttanina, ið stendst av at arbeiðspláss flyta til láglønarlond, vísir Uni á, at ferðavinnan ongan trupulleika hevur í so máta.

– Føroyska ferðavinnan verður altíð beint her, og hesi arbeiðsplássini enda sjálvsagt ikki í Kina. Alheimsgerðin gevur økta ferðing, lægri flutningskostnað og atgongd til nýggjar marknaðir, tí gevur hon ferðavinnuni nýggjar møguleikar, sigur Uni Danielsen at enda.

# Amin vitjar í vikuskiftinum

**Komandi leygarkvøld fer kendi danski undirhaldarin Amin Jensen á pall í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

UNDIRHALD
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tá ið Amin Jensen vitjaði í Føroyum á Ólavsøku í fjør, dámdi honum so mikið væl, at hann gjørdi av at vitja aftur í vár. Saman við Jákup Jacobsen, ið stóð fyri praktiska partinum av vitjanini hjá Amin í fjør summar, hevur danin tikið stig til vitjanina í vikuskiftinum.

### Endin á rundferð

Amin Jensen hevur verið á rundferð í Danmark síðani í januar mánað við showinum hjá sær, og hann dylur ikki fyri, at talan hevur verið um eina sera væleydnaða rundferð. Endabresturin á sjálvari rundferðini verður vitjanin í Føroyum, men Amin Jensen sigur, at talan tó ikki verður um heilt tað somu framførsluna sum vanligt, tí ikki ber til at fáa alla útgerðina við sær til Føroya, ið vanliga verður nýtt í Danmark.

Tó sigur stóri danin, at talan ikki verður um nakra lágprísútgávu av showinum hjá sær, sum áskoðararnir fara at uppliva í Fuglafirði leygarkvøldið.

- Nei, tað verður tað sama showið, men onkrar tillagingar verða tó gjørdar í sambandi við umstøðurnar, sigur Amin Jensen.

Showið hjá Amin Jensen, *Blæs på DK*, hevur fingið framúr góð ummæli í Danmark, bæði frá áskoðarum og frá ummælarum hjá donsku miðlunum. Sjálvur hevði Amin Jensen ikki væntað hetta.

- Tað kom eitt sindur óvart á meg, tí eg haldi hesaferð fari eg til markið, og møguligani eisini út um mark, og tí hevði eg heldur væntað, at onkur fór at finnast at showinum, greiðir Amin Jensen frá.



*Amin Jensen gleðir seg ómetaliga nógv til at koma á vitjan í Føroyum í vikuskiftinum, tá ið hann fer á pall í Mentanarhúsinum í Fuglafirði*

### Líkjast bornholmarum

Sambært Amin Jensen eru føroyingar sum áskoðarar ikki heilt ólíkir borholmarum.

- Føroyingar eru ómetaliga ærukærir eins og bornholmarar, men samstundis eru teir eisini sjálvironiskir, og tað dámar mær stak væl. Eg haldi eisini, at eg sjálvur líkist teimum, og tað er kanska tað, ið ger, at eg kenni meg so mikið væl móttiknan og væl tilpassar í Føroyum, sigur Amin Jensen.